

**Dávid Isfeld**
*Hósvík*

# Dómsmorð á Jógvan Thomsen

*Hví fær dómsmorð (justitsmorð) frítt at virka í fjølmiðlunum fyri øll at skoða? Hvat billar samgongan sær inn? Tað var jú landsstýrismaðurin í vinnumálum, Jóhan Dahl, ið byrjaði hetta dómsmorð – við vælsignilsi frá løgmanni*

Nú blussaði upp aftur í Vágaportalinum um Jógvan Thomsen stjóra í Skrásetingini og Fjarskiftiseftirlitinum, nýggjar ákærur, men óivað sama dagsskrá: at fremja dómsmorð á Jógvan Thomsen. Nú varð sagt, at Jógvan Thomsen loyniliga "bandar samrøður, sum hann hevur." Og tað skal hann hava "gjørt í fleiri ár, sigur keldan hjá Vágaportalinum."

### Hvør kelda?

Henda sokallaða kelda sigst av Vágaportalinum at vera álítandi. Vit vita einki um hesa keldu, ella um hon er til. Hetta er so lætt sloppið, tí at keldur hava ávísan rætt til at vera dulnevndar, og standa tí ikki til svars fyri nakað, og Vágaportalurin, í hesum førinum, er bert boðberin og nýtist tískil heldur ikki at standa til svars fyri hesar skaðiligu leysasøgur. Gerið so væl øll somul, nú er loyvi at fremja dómsmorð – ein skal bert velja ímillum at vera boðberi ella kelda.

### "The Power of Suggestion" - sterka ávirkanin av tilsipan

Jógvan Thomsen hevur stutt og greitt víst ákærunum aftur á Vágaportalinum. Trupulleikin er bara, at nú er ivin sáðaður, og nógv fólk fara at hugsa: 'Sjálvandi vísir Jógvan ákærunum aftur, men er hann ósekur?' Tað er eisini syrgiligi sannleikin. At vísa ákæruni aftur er ikki prógv fyri at vera ósekur, tí er skaðin gjørdur beinanvegin, og er hetta ov vánaligt, at tað fær loyvi at virka soleiðis. Tað er óræ ttvíst, at bara Jógvan Thomsen skal standa til svars, meðan ósjónligir ákærarar vaska hendurnar í tí dulda. Og hvar er rættartrygdin hjá okkum, ið ikki hava politiskt vald ella aðra máttmikla ávirkan?

### Okkara »fitti« løgmaður

Fyri at fyrru óreiðiligu ákærurnar frá Jóhan Dahl skuldi fáa frið at standa, mátti hetta fáa vælsignilsi frá hægri staði, nevniliga frá Kaj Leo Johannesen, Løgmanni, og hann var ikki seinur í vendiningini hesu ferð, men segði sín landsstýrismann at hava handla innan sínar heimildir. Hevur ein landsstýrismaður heimild til at føra fram falskar ákærur ímóti sínum embætisfólkum og soleiðis skaða teirra arbeiðsintegritet og framtíðarútlit innan embætismannaverkið? Eg haldi ikki, og tað meti eg heldur ikki, at Løgmaður veruliga heldur. Løgmaður er ov veikur og ov feikur; vildi bert fáa frið, leggja lok á málið og lata Jógvan kóka undir lokinum. Hetta er ikki tað, ein "fittur" ella rættvísur løgmaður ger. Hetta er eisini orsøkin til, at tað enn prutlar undir lokinum við nýggjum ákærum, tí Løgmaður vildi ikki gera tað trupla og rætta, nevniliga at kolldøma og sostatt enda slíkan ágang ímóti einum borgara, sum hann er løgmaður hjá.



**Helgi Abrahamsen**
*løgtingsmaður*

# Tilvildin stýrir føroyska samleikanum

*Ofta kann ein undrast á, hvussu tilvildin sleppur at ráða í spurningum, sum hava við okkara tjóðareyðkenni at gera*

Vit vita øll, at tjaldrið er føroyskur tjóðfuglur, men eingin veit, hvør hevur valt tjaldrið fram um aðrar fuglar, til henda leiklut. Jú vit vita, at hugskotið er sprottið úr Fuglakvæðnum, men hví tað skuldi gera júst henda fuglin til tjóðfugl, og hvør hevur tikið hesa avgerð, og við hvørji heimild, er ógreitt.

Vit hava ein vakran tjóðsang, sum helst øll eru glað fyri, men eingin veit, hvør hevur avgjørt, at júst hesin sangurin skuldi vera tjóðsangur. Vit høvdu einaferð ein annan tjóðsang, men onkur (eingin veit hvør) hevur býtt teir um.

Fyri nøkrum árum síðani fann onkur uppá at skipa fyri einum vali, har føroyska tjóðarblóman skuldu veljast. Tá úrslitið fyrilá, var mýrusóljan vald sum føroysk tjóðarblóma. Hvør ið gav heimild til at skipa fyri hesum vali og at góðkenna valúrslitið, er ilt at siga.

Um eg, tá eg gekk í skúla, hevði skrivað um ein "kovboy", so hevði lærarin sett ta reyðu strikuna undir orðið og sagt, at tað var ein feilur. Men nú ber til at skriva "kovboy" í skúlanum, tí nú er ein orðabók á marknaðinum, sum skrivar orðið soleiðis. Orðabókarithøvundar fáa óavmarkaðar heimildir til at stava orð júst soleiðis, sum teir halda, at tað skal gerast, og frá tí degi, tá orðabókin kemur á marknaðin, er loyvt at stava orðið soleiðis. Hvør ið gevur hesa heimildina, veit eingin.

Kjakast hevur verið nú í eina tíð um føroyska stavraðið. Onkur sigur at nakrir bókstavir skulu ikki vera loyvdir, meðan onnur hava aðra meining. Eingin veit, hvør hevur givið heimild til at velja og vraka, og argumentini eru ofta ósamanhangandi.

Og nú er Atlasið aftur komið á dagsskránna, og øll hyggja spyrjandi uppá hvønn annan. Hvør skal geva heimild til at geva nøkrum útvaldum rætt at avgera, hvussu staðarnøvn skulu eita og stavast? Vit hava eina Staðanavnanevnd, men hon má ikki fáa nakra heimild, tí har situr onkur, ið hevur sjónarmið, sum onkrum øðrum ikki dámar. Tí má bíðast eftir eini aðrari málnevnd, sum møguliga fer at siga nakað annað (treytað av, at tað eydnast at fáa tey "røttu" fólkini vald í hana). Hvør ið hevur heimild at avgera alt hetta, vita bara tey, sum hava givið sær sjálvum henda rættin.

Tað tykist sum at øll eru samd um, at politiski myndugleikin skal ikki hava avgerandi orðið at siga á hesum øki. Tað kann vera bæði rætt og rímiligt. Men eitt er at semjast um, hvør IKKI skal ráða. Verri gongur at finna útav, hvør SKAL ráða. Fyribils ræður tann, sum klárar at útnevna seg sjálvan.



**Marjus Dam**
*Løgtingsmaður*

# Tunnilsætlanin hjá Bank Nordic er hol í høvdið

*Um tíðindini í SVF eru eftirfarandi. Ætlanin er so blóðórættvís.*

Ein kann spyrja, um ferðaseðlaprísurin eisini skal hækkast við t.d. 100 kr hjá Súluni, Sildberanum, Sam, Teistanum, Smyrli o.ø. So høvdu tey ið ferðast sjóvegis eisini "sloppið" at verið við til at stuðla útbyggingina av Skálafjarðartunnlinum. Og við at legga enn meiri byrðar á tey, ið longu nú gjalda nógv fyri at ferðast, kunnu tey, sum í dag sleppa undan at gjalda, framhaldandi sleppa undan.

Álvaratos. Hetta uppskot í Bank Nordik kemur við, er heilt langt úti.

Avtalan við bæði Vága tunnli og Norðoya tunnli var, at restupphæddin skuldi gjaldast niður av teimum ið ferðaðust. Tá tunnlarnir vóru niðurgoldnir, skuldi koyrast eftir somu treytum har, sum eftir landsvegakervinum annars. Tað var og er avtalan, og henni kunnu vit liva við.

Eg má spyrja Jóannis Eidesgaard: hvar er solidariteturin í "hol í høvd uppskotinum" hjá CHE og Bank Nordic?. Boðini eru nevniliga greið: Vágafólk og Norðoyingar skulu gjalda Eysturoyartunnilin –stórt sæð. Hví skulu hesi fólk gjalda milliarda upphæddir meira enn aðrir føroyingar? Er tað ikki ósolidariskt?

Korta nei til hasa ætlanina hjá CHE og Bank Nordic.

Latið vera við at gera ein part av Føroyum til økir, har avgjaldstrælir búgva.

Mítt ynski er at vit

**1:** Lata ferðsluna gjalda Eysturoyartunnilin

**2:** Lata øll gjalda Sandoyartunnilin